# Skansarnir hjá Hitler

Adolf Hitler helt, at tað hevði avgerandi týdning, at hann kundi hava tamarhald á innsiglingini til Skagerrak, og tí gjørdi hann danska fiskivinnubýin Hantsholm til ein av sínum størstu skansum í Norðureuropa við fleiri hundrað bunkarum og kanónstøðum.

Danmark varð hertikið av týskarunum undir seinna heimsbardagar, og Hanstholm hevði stóran týdning fyri týska herin. 800 fólk búðu í Hanstholm, tá ið týskarnir komu til býin, og krígsárini fór ein stór hernaðardubbing fram í fiskivinnubýnum, har Norrøna hevur sína donsku havn.

3.000 hermenn høvdu støð í Hantsholm undir krígnum, og tá ið kríggið endaði var eitt ótal av skansum og kanónstøðum í býnum.

Týsak herleiðslan helt, at verjan av Skagerrak skuldi fara fram úr Hantsholm øðrumegin og úr Kristiansand í Noregi hinumegin. Har skuldu kanónirnar gera sum frægast fyri at verja 120 kilometrarar breiða farvatnið millum Danmark og Noreg, so at sameindu styrkirnar ikki kundu sigla inn í Skagerrak og koma til dømis eystureuropeisku londunum við Eystursjóvgin til hjálpar.

Í dag ber til at síggja levidirnar av skansunum hjá týskarunum, og eitt serligt savn er gjørt í einum av stóru bunkarunum undir jørð. Í Museumsbunkeren ber til at fáa eina hóming av lívinum í einum bunkara undir krígnum, og søgan fer veruliga lív millum teir teir fugtigu betongveggirnar.



*Í Hantsholm ber til at vitja ein av stóru bunkarunum, sum týski herurin bygdi í Danmark undir seinna heimsbardaga*




















